


## FUNDIR, TILTØK O.A. Í NOVEMBER M.A.:

**6. nov.** Luttøka í Altjóðadegnum hjá Háskóla Íslands vegna Fróðskaparsetur Føroya

**7.-8. nov.** Taka lut í Sjávarútvegsráðstefnan 2019 (The Seafood Conference Iceland) í Hörpu.

**7. nov.** Móttøka hjá japanska sendiharranum (sýning av japanskum filmi)

**9. nov.** Luttøka í norðurlendskum tiltaki í Norðurlandahúsinum í Rvk. í sambandi við Iceland Airwaves.

**10. nov.** Til Remembrance Day (minningardagur teirra falnu í heimskríggjunum) tiltak hjá enska og týska sendiharranum.

**11. nov.** Luttøka í Altjóðadegi hjá íslendska vinnulívinum.

**13. nov.** Vitja UK Royal Air Force deildina á Keflavíkar Air Base

**16. nov.** Taka lut í hátíðarhaldi í skógini Heiðmörk í sambandi við, at jólatræið til Tórshavnar kommunu verður felt.

**19. nov.** Vitjan av og fyrilestur fyri lesandi frá Háskóla Íslands.

**19. nov.** Móttøka hjá franska sendiharranum.

**29. nov.** Vitja Norðurál (aluminiumsverksmiðja) saman við norðurlendsku sendiharrunum.

## VALSKEIÐIÐ HÁLVRUNNIÐ

Seinast í oktober mánaði vóru tvey ár síðan val var seinast. Sostatt hevur verandi trý flokka samgongan millum Vinstru grønu, Sjálfstæðisflokkin og Framsóknarflokkin smá tvey ár eftir til val í seinasta lagi eigur at verða.

*»Fá høvdu roknað við eini stjórn við Vinstru grønu og Sjálvstæðisflokkinum, sum politiskt standa so langt frá hvørjum øðrum. Tá samgongan varð skipað 30. november 2017, var ikki nógv eftir, sum kundi koma óvart á í íslendskum politikki uttan tað, at stjórin er komin hálva leið ígjøgnum uttan størri ósemjur og fráfall og at hon hevur stóra undirtøku í veljarakanningunum, samstundis sum samgonguflokkarnir hava mist undirtøku hvør sær. «*

Støðan undan hesari samgonguni var eitt sindur rokmikil. Fyrst noyddist Sigmundur Davíð Gunnlaugsson frá sum forsætisráðharri orsakað av hansara luti í Panama skjølunum í 2016. Sigurður Ingi Jóhannsson tók síðan við sum forsætisráðharri til valið var útskrivað og hildið í oktober 2016. Eftir drúgva tíð eydnaðist tað Bjarna Benediktsson at skipa stjórn við Björt framtíð og Viðreisn, men henda stjórn hevði ikki langt lív lagað, tí longu 8 mánaðir eftir at hon varð skipað, stóðst rumbul um m.a. pápa Bjarna Benediktsson, sum hevði skrivað undir skjal, ið skuldi endurreisa heiður og æru hjá einum persóni, sum var dømdur fyri grovt lógarbrot. Björt framtíð fór úr stjórnini og val varð útskrivað.

Enn hevur eingin tríflokka stjórn sitið alt valskeiðið í søgu Íslands. Valúrslitið til seinasta val vísti, at tað var ikki gjørligt hjá tveimum flokkum at skipa stjórn og fyri ikki at fáa eina fýraflokka stjórn, so



*Mynd 1. Frá tíðindafundi 30. november 2017, tá ið Ríkisstjórn Katrínar Jakobsdóttur sá dagsins ljós. Frá vinstru Bjarni Benediktsson, fíggjarmálaráðharri og formaður í Sjálfstæðisflokkinum, Katrín Jakobsdóttir, forsætisráðharri og forkvinna í Vinstru grønu og Sigurður Ingi Jóhannsson, flutnings- og kommunumálaráðharri og formaður í Framsóknarflokkinum.*

varð tað neyðugt hjá Sjálfstæðisflokkinum og Vinstru grønu at finna saman. Tá samgongan millum Vinstru grønu, Sjálfstæðisflokkin og Framsóknarflokkin sá dagsins ljós, tóku tveir limir í tingbólkinum hjá Vinstru grønu ikki undir við samgonguni. Hóast hetta, gjørdist Katrín Jakobsdóttir næsti kvinnuligi forsætisráðharrin, Bjarni Benediktsson fíggjarmálaráðharri og Sigurður Ingi Jóhannsson flutnings- og kommunumálaráðharri. Stjórnin er sostatt undir leiðslu av trimum floksformonnum, sum antin hava verið ella eru forsætisráðharrar. Tá nýggja stjórnin tók við valdinum boðaði hon frá, at hon vildi virka fyri møguleikum og støðufesti.

Ein av stóru avbjóðingunum, sum nýggja stjórnin fekk undir land í vár, vóru sera truplu lønarsamráðingarnar, ið vórðu loystar við at fáa felags sáttmálar (“kollektive overenskomster”) millum fakfeløgini og arbeiðsgevarafeløgini, sum nevndist “sáttmálin um lívskor” (“lífskjarasamningurinn”). Henda avtala er galdandi fram til 2022 og skal tryggja keypsorkuna hjá lønmóttakarunum, varandi lægri prísvøkstur og lægri rentur. Sáttmálin varð gjørdur av stjórnini í samstarvi við partarnar á arbeiðsmarknaðinum.



*Mynd 2. Sigríður Andersen, mátti lúta fyri niðurstøðuni hjá Evropiska Mannarættindadómstólinum í sambandi við tilnevning av dómarum í landsrættin.*

Tríggir dómsmálaráðharrar hava verið seinastu tvey árini. Sigríður Andersen var tann fyrsti, men hon kom í trupulleikar, tá hon tilnevndi dómarar til nýggja landsrættin. Hon frávaldi fleiri av teimum dómarum, sum metingarnevndin hevði mett sum best skikkaðar og valdi aðrar longri niðri á listanum. Evropiski Mannarættindadómstólurin kom til ta niðurstøðu, at Sigríður hevði brotið lógina og noyddist tí frá sum dómsmálaráðharri.




*Mynd 3. Skúli Mogensen, stovnari og einaeigari av WOW air, sum nú er farið á húsagang.*

Stjórnin kom undir stórt trýst, tá WOW air fór á húsagang, og hetta hevði eisini ávirkan á lønarsamráðingarnar. Fleiri enn túsund starvsfólk mistu teirra størv og týdningarmikla ferðavinnan fekk stórar avbjóðingar. Stjórnin vildi ikki bjarga WOW air. Ferðafólkatalið er lækkað við uml. 25% fyrstu 10 mánaðirnar í ár samanborið við sama tíðarskeið í fjør.

Nýliga fekk stjórnin avbjóðingar av at Ísland var komið á gráa listan hjá FATF (Financial Action Task Force) yvir lond, sum ikki gera nóg mikið fyri at stríðast ímóti hvítting av peningi og fígging av yvirgangi. Hetta kom illa við hjá Íslandi og fer ikki at gera lívið lættari hjá íslendskum fyritøkum í útlondum. Stjórnin vónar við sínum tiltøkum at koma av aftur gráa listanum í februar næsta ár. Ikki nokk við hesum, so kom Samherja málið í Namibia afturat, sum steinur oman á byrðu.

Stjórnin hevur fráboðað fleiri stórmál, sum eru løgd fyri Altingið. Sum dømi kann nevnast hvítbókin um framtíðina hjá fíggjargeiranum, ið m.a. fevnir um uppskot um sølu av teimum bankum, sum ríkið eigur og sum er ætlað at vera ein vegleiðing hjá

stjórnini til avgerðir um, hvussu fíggjargeirin skal skipast í framtíðini. Flutningsmálaráðharrin hevur nýliga lagt fram framtíðarætlanirnar fyri flutningskervið, sum m.a. fevnir um fleiri stórar verkætlanir og luttøku ríkisins í betran og fremjan av almennum flutningi.

*Sí meira her (á íslendskum) og her (á enskum)*

## FYRIMUNIR OG VANSAR VIÐ ÍSLENDSKA EBS-LIMASKAPINUM



*Mynd 4. Björn Bjarnason, fyrrv. menta- og dómsmálaráðharri, var formaður í arbeiðsbólkinum, sum varð settur at kanna fyrimunir og vansar við EBS limaskapinum nú, hann hevur 25 ár á baki.*

Ein arbeiðsbólkur, sum íslendski uttanríkisráðharrin Guðlaugur Þór Þórðarson setti í august 2018, hevur latið úr hondum álit um íslendska limaskapin í EBS (Evropeiska Búskaparliga Samstarvið), sum Ísland gjørdist partur av í 1994. Í ár eru tað sostatt 25 ár síðan Ísland gjørdist partur av EBS. Björn Bjarnason, fyrrv. mentamála- og dómsmálaráðharri, var formaður í arbeiðsbólkinum. Frágreiðingin kemur til ta niðurstøðu, at Ísland er farið gjøgnum stórar broytingar í kjalarvørrinum av EBS limaskapinum í 1994. So at siga øll, sum arbeiðsbólkurin hevur verið í sambandi við, siga, at EBS avtalan gongur væl og er góð fyri Ísland. Frágreiðingin staðfestir eisini at EBS avtalan røkkur allar tættir í samfelagnum. Sum dømi verður nevnt, at 485 lógir av 3.071 samtyktum lógum síðan 1992/93 eru beinleiðis úrslit av EBS samstarvinum.

*Sí meira her (á íslendskum) og her (á enskum. Niðast í greinini er ein leinkja til brot úr frágreiðingini á enskum).*

## LANGTÍÐARÆTLAN FYRI ÍSLENDSKAN ÚTFLUTNING




*Mynd 5. Frágreiðingin um langtíðarætlan fyri íslendskan útflutning, sum varð almannakunngjørd 23. oktober.*

Íslandsstofa ("Promote Iceland") hevur almannakunngjørt eina nýggja langtíðarætlan, sum stjórnin og vinnulívið stendur aftanfyri. Íslandsstofa hevur gjørt ætlanina vegna Uttanríkisráðið og í tøttum samstarvi við íslendska vinnulívið. Tilsamans hava 400 fólk luttikið í 13 verkstovum, sum hava verið hildnar um alt landið við umboðum frá størstu útflutnings vinnugreinunum.

Langtíðarætlanin leggur áherðslu á seks strategiskar raðfestingar. Hesar fevna vítt í íslendsku vinnugreinunum og nema við siðbundna útflutningsvinnu, men eisini skapandi vinnu, uppfinning, nýskapan og tøkni. Tey seks økini, sum dentur skal leggjast á, er innan hesar vinnugreinar:

1) Orka og grønar loysnir
2) Skapanarevni, nýskapan og tøkni
3) List og skapandi greinar
4) Ferðavinna
5) Fiskivinna
6) Serligar matvørur og natúrframleiðsla

Siðbundnu útflutningsgreinirnar; Fiskivinna, ferðavinna og orkutungi ídnaðurin (aluminium) eru á tryggum grundarlagi og teirra møguleikar fyri vøkstri liggur í sterkari marknaðarførslu. Mentanarligt virksemi og skapandi ídnaðurin standa frammarlaga í altjóða sambandi. Intellektuellur útflutningur, sum viðvíkur nýskapan og tøkni, hevur stórar møguleikar og stórur vøkstur er í íverksetara virksemi.

*Sí meira her (á íslendskum)*

## ARCTIC CIRCLE RÁÐSTEVNAN




*Mynd 6. Jenis av Rana, uttanríkis- og mentamálaráðharri, flutti fram røðu undir setanini av Arctic Circle.*

Arctic Circle var aftur í ár hildin – á sjeynda sinni – í Reykjavík. Umleið 2.000 fólk frá 60 londum tóku lut. Íslendski forsætisráðharrin, Katrín Jakobsdóttir, heitti m.a. í sínari opningsrøðu á heimsins stjórnir um at lurta eftir ungdóminum viðv. veðurlagskreppuni og á londini og fyritøkurnar, sum dálka mest um at bøta um støðuna og taka ábyrgd fyri at loysa trupulleikarnar.
Amerikanski orkumálaráðharrin, Rick Perry, legði dent á, at áhugamálini hjá USA røkka væl longur enn bert til Alaska og at náttúrutilfeingið í økinum eigur at verða nýtt ábyrgdarfult og til fyrimuns fyri fólkini á staðnum.
Gao Feng, kinverskur serfrøðingur í arktiskum málum í kinverska uttanríkisráðnum, segði eisini, at Kina hevur stóran áhuga í Arktiska økinum og vildi gjarna vera meira við í hvussu økið verður stýrt. Hann nevndi eisini, at Kina hevði megnað at minka munandi um útlátið av veðurlagsgassum í mun til 2005 stigið, so Kina vildi rokkið málunum í Paris avtaluni.



*Mynd 7. Jenis av Rana, uttanríkis- og mentamálaráðharri, fundaðist eisini við starvsfelagar sínar úr íslandi og Grønlandi, á.v.v. Guðlaugur Þór Þórðarson og Ane Lone Bagger. Jenis tók lut í setan av føroyskum ráðstevnum, fundaðist m.a. við danska uttanríkisráðharran, íslendska mentamálaráðharran, Ólafur Ragnar Grímsson, fyrrv. forseta og formaður í Arctic Circle o.ø.*

Okkara uttanríkisráðharri, Jenis av Rana, var eisini ein av røðarunum til opningina. Jenis vísti á góðu sambondini millum Føroyar og Ísland á nógvum økjum, sum kundi víðkast til eisini at fevna um fólkini í arktiska økinum. Tað hevur stóran týdning at hava fokus á fólkunum, sum liva í arktiska økinum: Okkara mál, útbúgving, samfelag og mentan. Jenis vísti eisini á, hvussu vit liva í javnvág við náttúruna og burðardyggu nýtsluna av náttúrutilfeinginum, sum kundi verið dømi fyri heimssamfelagið. Eisini vísti Jenis á týdningin við at byrja við børnunum.

## NAKAÐ AV VIRKSEMI SENDISTOVUNNAR Í OKTOBER MÁNAÐI:

## VITJAN AV ÍSLENDSKU TINGLIMUNUM Í ÚTNORÐURRÁÐNUM

8. oktober vóru íslendsku tinglimirnir í Útnorðurráðnum saman við embætisfólkum á vitjan í sendistovuni. Teir høvdu biðið um at fáa innlit í føroysk viðurskifti í sínari heild og í politisku viðurskiftini

serliga nú, nýggj samgonga júst hevur tikið við. Sendimaðurin helt upplegg og nógvir spurningar og dúgligt kjak var. Ein sera áhugaverdur og góður fundur.

## TILTAK FYRI FØROYINGAR, SUM TÓKU LUT Í ARCTIC CIRCLE



*Mynd 8. Viðtjan av Kim Kielsen og øðrum góðum fólkum.*



Í sambandi við Arctic Circle ráðstevnuna, ið varð hildin í Hörpu í Reykjavík 10. – 13 oktober, skipaði sendistovan fyri móttøku fyri føroysku luttakarunum. Millum tey luttakandi vóru umboð frá politisku skipanini, føroysku vinnuni, frá Setrinum o.ø. Harafturat fingu vit vitjan av Kim Kielsen, grønlendska landsstýrisformanninum, saman við grønlendska sendimanninum í Íslandi og øðrum. Hetta er eitt afturvendandi tiltak, sum sendistovan skipar fyri og sum gevur høvi til at umrøða tað, sum fer fram undir Arctic Circle o.a.

## FØROYINGAR Í ÍSLANDI HITTA LANDSSTÝRISUMBOÐ OG LØGTINGSLIMIR



*Mynd 9. Føroyingar í Íslandi hittu umboð fyri landsstýri og løgtingi í salinum hjá Sendistovuni.*

Sunnudagin 13. oktober seinnapartin skipaði sendistovan fyri tiltaki fyri føroyingar, sum búgva í Reykjavík/Íslandi og føroyskar politikarar o.o., ið tóku lut í Arctic Circle. Jenis av Rana legði fyri og greiddi frá politikkinum hjá nýggju samgonguni. Síðan greiddi Kaj Leo Holm Johannesen frá og legði serligan dent á, hvat tað er samgongan vil røkka, eins og hann greiddi væl frá ætlanum við viðgerðartrygdini, sum landsstýrið ætlar at seta í verk. Aðrir politikarar høvdu eisini orðið og luttakararnir spurdu og kjakaðust. Eitt áhugavert tiltak fyri bæði føroyingar í Íslandi og politikarar, sum fingu høvi til at hitta føroyingar, ið hava búleikast leingi í Íslandi og føroyingar, sum eru í Íslandi í lestrarørindum.

## FYRILESTUR UM FØROYAR FYRI ROTARY CLUB Í HAFNAF.

Rotary Rótarýklúbburinn Straumur - Hafnarfjörður

*Mynd 10. Sendimaðurin helt fyrilestur fyri Rotary club í Hafnafirði.*

Sendimaðurin var biðin um at halda fyrilestur um Føroyar og føroysk viðurskifti fyri Rotary Club í Hafnafirði. Fitt av fólki var møtt upp og nógvir spurningar og nógv kjak var. Slíkir fundir gevur einastandandi gott høvi til at kunna og breiða út kunnleika um Føroyar, samstundis sum sendimaðurin og Sendistovan fær styrkt og víðkað um sítt virðismikla netverk.

**SENDISTOVA FØROYA Í REYKJAVÍK**
**TÚNGATA 14**
**101 REYKJAVÍK**

Tlf. +354 511 3200 T-postur: reykjavik@uvmr.fo
www.uvmr.fo Finn okkum á Facebook